UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **4. juli 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-65**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 117/2019 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52a Fyrispurningur um føroyskar borgarar, sum ikki sleppa heim vegna Koronafarsóttina, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. **Hvussu nógvar føroyskar borgarar veit Uttanríkis- og mentamálaráðið um, sum eru strandaðir uttanlands vegna Koronafarsóttina?**

2. **Hvat ger Uttanríkis- og mentamálaráðið fyri at hjálpa teimum, sum eru komin í hesa støðuna**?

3. **Hvussu nær er ein loysn fyri hesar borgarar, ið ikki sleppa heim til teirra kæru?**

4. **Hevur landsstýrið umrøtt alternativar møguleikar hjá hesum borgarum at sleppa heim til Føroya?**

Svar

Svar til 1-4: Spurningarnir verða svaraðir undir einum.

Í skrivandi løtu hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki kunnleika um føroyingar, sum eru strandaðir vegna koronafarsóttina.

Tá ið avmarkingar vórðu lagdar á ferðing millum lond til tess at forða fyri smittuspjaðing í mars í ár, heitti landsstýrið á føroyingar, t.e. øll, sum eru skrásett at búgva í Føroyum, um at koma heim sum skjótast. Eftir at landamørkini stongdu, sluppu bara FO-DK ríkisborgarar og útlendingar, sum eru skrásettir at búgva í Føroyum, til landið, umframt onkrir undantaksbólkar. Treytin fyri innferð var enn sum áður galdandi innferðar- og/ella uppihaldsloyvi.

Boðað varð samstundis frá, at føroyingar, sum búgva aðrastaðni enn í Føroyum, ikki eiga at ferðast, men at fylgja tilráðingum í teimum londum, har teir hava bústað.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Uttanríkistænastan fekk nógvar fráboðanir og fyrispurningar frá føroyingum og frá útlendingum, ið búgva í Føroyum, men sum vóru staddir uttanlands, og ráðgav um ferðamøguleikar til Føroya. Í summum førum bar lutfalsliga skjótt til at finna eina ferðaloysn, men í øðrum førum tók tað drúgvari tíð.

Ráðgevingin var samsvarandi galdandi ferðaleiðbeiningum. Í hesum sambandi hevur Uttanríkistænastan verið í neyvum samskifti við danska uttanríkisráðið og eisini verið partur av felags norðurlendskum samstarvi, sum hevur samskipað t.d. serflúgving, sum fleiri føroyingar hava brúkt. Fleiri hava eisini verið í beinleiðis samskifti við danska uttanríkisráðið.

Sum nevnt hava vit ikki kunnleika um føroyingar, sum ikki sleppa heim vegna koronafarsóttina. Vit eru kortini vitandi um, at tað undir farsóttini hevur víst seg at vera trupult hjá útlendskum makum, sum ikki búgva í Føroyum, at fáa/at søkja um innferðarloyvi til Føroya. Uttan galdandi ríkisborgaraskap, uppihalds- ella innferðarloyvi er ikki møguligt at ferðast til Føroya. Sum óivað kunnugt eru útlendingamál tó ikki partur av uttanríkismálum, men hoyra útlendinga myndugleikunum til.

Uttanríkis- og mentamálaráðið veit eisini um føroyingar, sum hava valt at vera verandi, har teir eru, til líkindini at ferðast til Føroya gerast betur.

Nú lond eru byrjað at lata mørk síni uppaftur, er sannlíkt, at ferðamøguleikarnir fara at økjast.

Landsstýrið hevur ikki umrøtt egnar alternativar ferðamøguleikar, tí tey samstørv millum m.a. Norðurlond, sum landsstýrið hevur verið partur av, hava virkað sum ætlað, – og okkum kunnugt er ongin tørvur á hesum í løtuni til tess at fáa føroyingar heim.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ummr@ummr.fo • www.ummr.fo